# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Ása Midjord 70 ár



Í dag fyllir Ása Midjord í Fuglafirði 70 ár. Ása er fødd 9. desember 1934 í Leirvík, og er hon dóttir Sigurd Simonsen úr Sandavági, og Marthu fødd Joensen úr Leirvík. Ása er elst av 9 systkjum, og lærdi hon tí tíðliga at taka ábyrgd og hava umsorgan fyri øðrum. Pápi hennara, Sigurd hevur sagt frá í samrøðu, at longu tá ið Ása var 5 ára gomul, leit hann á hana at senda hana ørindi fyri seg. Hon vaks upp, sum barn í teimum fátæku tríatiárunum og teimum sváru krígsárunum, 1940-45 har pápi hennara sigldi øll krígsárini.

Blaðung fekk hon starv sum servitrisa á Hotel Hafnia, ið Christian Dahl Restorff stovnaði í 1951. Christian Dahl Restorff helt nógv av Ásu, og gav hann henni tað álit at verða bestýrari á Hotel Hafnia tær ferðirnar hann var burturstaddur í forrætningsørindum.

Hon gavst í hesum starvi tá hon bleiv gift við Peturi Midjord úr Fuglafirði. Petur er sonur Rikku og Gordon Midjord úr Fuglafirði. Ása og Petur giftust 21. juni 1958. Tey eiga børnini Ann, Birgith og Gordon Martin. Ann er gift við Poul Jacob Mohr úr Fuglafirði, og eru tey búsett í Fuglafirði. Birgith er gift við Krisjan Christiansen úr Havn, og búgva tey á Argjum. Gordon Martin er giftur við Davis Joensen úr Klaksvík, og búgva tey eisini í Fuglafirði. Ása og Petur eiga 7 barnabørn.

Ása hevur verið nærløgd og arbeiðssom alla sína tíð, og eitt langt skifti rak hon handil í Fuglafirði. Fyrst kolonialhandil og síðani eina gávubúð, ið nevndist "Anbigo", uppkallað eftir børnunum. Síðstu nógvu árini hevur hon tikið mangt takið á skrivstovuni hjá P/F "Sandgrevstri", sum hon hevur rikið saman við manninum og soninum.

Ása er tiltikin gávumild, og eru vit mong, ið við takksemi hava kent fløvan frá hennara gávumildu hondum. Hon hevur eisini verið trúføst ímóti sínum nærmastu, og síðani Martha og Sigurd fóru heim til Harran hevur Ása verið tann savnandi megin í familjuni. Hon fylgir væl við í tí, sum systkini og bróðirog systurbørnini takast við, og er altíð til reiðar við einum góðum orði ella einari áminning.

Vit tíni nærmastu heilsa tær Ása, og takka tær fyri títt trúfesti og gávumildni, og ynska vit tær og Peturi eitt blítt og gott lívskvøld við Harrans ríku signing. Hjartaliga tillukku við teimum 70 árunum!

**Familja og vinir**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

Thomas Magnussen, Tórshavn:

## Leiðari á Skeiðsdeplinum



Leiðslan á Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla í Tórshavn hava sett Thomas Magnussen í starv sum leiðara á Skeiðsdeplinum.

Thomas Magnussen er 42 ár og er útbúgvin løgfrøðingur. Hann hevur seinastu árini starvast í Fíggjarmálaráðnum, sum deildarstjóri á Lønardeildini.

Harafturat hevur hann starvast sum fulltrúi á landsskrivstovuni frá 1994-1997, og varð fyribilssettur stjóri á Strandfaraskipum Landsins frá 1992-1994.

Thomas Magnussen hevur annars royndir sum skeiðhaldari á Skeiðsdeplinum.

Tað er ikki endaliga avgjørt, nær Thomas Magnussen byrjar í starvinum, men tað verður helst í februar 2005.

Torfinn Nón, Fuglafjørður:

## Tvey 13 tøl til próvtøkuna sum byggifrøðingur



Mikudagin 8. desember 2004 fekk Torfinn Nón, Fuglafjørður, handað prógv sum byggifrøðingur á Byggeteknisk Højskole í Haslev.

Til próvtøkuna gjørdi hann seruppgávu um akustikk í konsersalum, og høvuðsuppgávan var at seta eina hædd oman á ein íbúðarbygning. Fyri hesar báðar uppgávurnar fekk Torfinn tvey 13-tøl, sum ikki er heilt vanligt.

Torfinn er 33 ára gamal og útbúgvin snikkari, hann er sonur Jonnu, f. Højgaard úr Rituvík, og Jim Nón í Fuglafirði.

Á sumri 2000 tók Torfinn prógv sum byggiteknikari á Byggeteknisk Højskole í Horsens.

Síðan arbeiddi hann sum timburmaður í Føroyum, til hann byrjaði aftur á skúlanum í Haslev januar 2003.

# Sangbólkurin SALT til Skotlands



*Hósdagin 9. desember fer Sangbólkurin SALT til Skotlands. Tey eru boðin at syngja við á eini jólakonsert í Motherwell, sum liggur nakað sunnan fyri Glasgow*

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 9. desember fer Sangbólkurin SALT til Skotlands. Tey eru boðin at syngja við á eini jólakonsert í Motherwell, sum liggur nakað sunnan fyri Glasgow.

Konsertin verður hildin í Motherwell Civic Centre leygardagin 11. december kl. 19.00 og verður í tveimum pørtum. Í fyrru helvt framførir hvør bólkur einar 4 sangir í part, síðani verður ein steðgur í 20 minuttir. Aftaná steðgin framføra tey so aftur einar 4 sangir í part.

Umframt SALT luttaka The Gospel Heirs, manstrio úr Glasgow, Crystal Clear, kvinnutrio úr Glasgow og Jane Gallan, solosanga rinna. Eins og S A L T hava hesi eisini luttikið á Gospel Music Convention í Fraserburgh í Skotlandi.

Konsertin eitur The 6th Annual Christmas Greetings Concert og tað er Crystal Clear sum hevur boðið SALT at syngja við á hesi konsertini.

Heimasíðan hjá SALT er www. salt.fo

**Dagurin**

**9. desember. Rólvur**. Teir vita einki halgimenni at navni Rólvur ella Rudolf. Komið upp í álmanakkan í 1727.

Navnið er týskt, sett saman av *hrodr*, ið merkir heiður og *wulf*, ið merkir úlvur.